UTTAN ÚR HEIMI

# Mossad ætlaði at beina fyri bin Laden

**Ísraelska fregnartænastan ætlaði at beina fyri Osama bin Laden longu í 1996, skrivar eitt ísraelskt blað.**

ÍSRAEL
*Árni Joensen: fartekst@mail.dk*

Sambært blaðnum Yedioth Ahronoth hevði Mossad leigað eina kvinnu, sum skuldi myrða bin Laden, men politisk viðurskifti gjørdu, at Mossad mátti sleppa ætlanini, skrivar blaðið, sum sigur seg hava tíðindini frá keldum í sjálvari fregnartænastuni.

Sambært keldunum kom Mossad fram á bin Laden í 1995, tá egyptiski forsetin, Hosni Mubarak, var fyri einari miseydnaðari morðroynd, meðan hann var og vitjaði í Etiopia. Mossad hjálpti CIA og egyptisku fregnartænastuni at kanna tilburðin og kom í tí sambandi fram á ein yvirgangsbólk í Sudan. Tað vísti seg, at saudiarabin Osama bin Laden stóð á odda fyri bólkinum.

Tað eydnaðist ísraelsku fregnartænastuni at fáa samband við eina kvinnu, sum kendi bin Laden. Keldurnar vilja ikki siga, hvørjum landi kvinnan var úr, men tær siga, at Mossad samstarvaði við fregnartænastuna í heimlandi hennara.

Sambært Yedioth Ahronoth bleiv morðætlanin slept, tá samráðingarnar ímillum Ísrael og palestinar slitnaðu, og slitið gjørdi, at fregnartænastan í heimlandinum hjá kvinnuni sleit samstarvið við Mossad. Tá ísraelska fregnartænastan gjørdi av at taka málið uppaftur nøkur ár seinni, var bin Laden ikki at finna.

Dany Yatom, sum var stjóri í Mossad í 1996, vil ikki siga nakað um avdúkingarnar hjá ísraelska blaðnum, skrivar Reuters.



*Longu í 1996 hevði Mossad lagt eina ætlan um at myrða Osama bin Laden.*

# Kjarnorkan vinnur fram

**Veðurlagsbroytingar og ivasamar orkuveitingar hava fingið fleiri lond at útvega sær kjarnorku, meðan onnur byggja fleiri verk.**

KJARNORKA
*Árni Joensen: fartekst@mail.dk*

Síðani Tjernobylvanlukkuna fyri skjótt 20 árum síðani hava evropeiskir politikarar verið varnir við at tosa um kjarnorku sum ein hátt at nøkta tann veksandi eftirspurningin, men soleiðis er ikki longur.

– Tá Russland skrúvaði fyri gassinum til Ukraina á nýggjárinum, fóru ávaringarklokkur at ringja nógvastaðni í Evropa, tí brádliga varnaðust londini, hvussu bundin tey eru at russiska gassinum., sigur franski innanríkisráðharrin, Francois Loos, við International Herald Tribune.

Í vikuni er bretska stjórnin farin undir nakrar hoyringar um orkupolitikkin, og fleiri eygleiðarar í London siga, at tað er lítil ivi um, at stjórnin miðjar eftir at økja kjarnorkuna, og at Tony Blair, forsætisráðharri, heldur kjarnorkuna vera ta einastu loysnina at nøkta tann veksandi orkutørvin.

Frakland, sum fær ein stóran part av sínari orku frá kjarnorkuverkum, hevur sent ES eitt uppskot um eina komandi orkuætlan, og sum í høvuðsheitum er grundað á kjarnorku. Samstundis ljóðar, at Spania, Niðurlond og Sveits umhugsa at byggja nýggj kjarnorkuverk. Finnland er í ferð við at byggja heimsins størsta kjarnorkuverk, og Washington Post skrivaði í vikuni, at USA umhugsar at byggja nýggj verk.

Sambært International Herald Tribune eru fleiri orsøkir til, at lond ætla at útbyggja kjarnorkuna. Veðurlagsbroytingarnar eru ein orsøk, vandin, fyri at oljugoymslurnar kring heimin fara at tømast, er ein onnur, og krøvini í Kyotosáttmálanum eru ein triðja. Harafturat kemur, at sambært altjóða orkustovninum fer orkunýtslan at veksa heili 60 prosent tey næstu 25 árini. Vøksturin verður størstur í Kina og India, og tey bæði londini hava eisini lagt stórar ætlanir um at útbyggja kjarnorkuna. Kinesarar skulu hava 32 reaktorar afturat teimum 11, sum landið hevur nú, og India ætlar at fleirfalda sína kjarnorku. Í Týsklandi hava politikararnir hava verið samdir um at skerja kjarnorkuframleiðsluna, men nú eru politikararnir farnir at umhugsa støðuna av nýggjum, skrivar International Herald Tribune.

Samstundis vísa kanningar, at í Týsklandi og aðrastaðni í Evropa eru fólk yvirhøvur ímóti kjarnorku. Herfyri spurdi ein ES-stovnur 30.000 fólk, hvat tey hildu, og bara 12 proswent svaraðu, at tey eru fyri at leggja størri dent á kjarnorku.

## 71 kuldastig í Sibir

Amerikanska blaðið Christian Science Monitor veit at siga, at í síðstu viku vórðu máld 71 kuldastig í Jakutsk har norðuri í Sibir. Mátingin er tó ikki viðurkend enn, tí sambært reglunum skal kuldamátarin fyrst kannast í einari góðkendari rannsóknarstovu. Men er mátingin í lagi, so verður Jakutsk skrásett sum tað kaldasta staðið á norðaru jarðarhálvu. Mesti kuldi, sum fyrr er skrásettur á norðaru jarðarhálvu, er 67,8 kuldastig. Tað var í Verkhojansk og Omjakon í Sibir.

Mesti kuldi, sum er skrásettur á Jørðini, er 89,6 stig, og tað var á Antarktis tann 21. januar í 1987. Nakað seinni vildi ein russisk støð á Antarktis vera við, at mátarin har hevði víst 92,1 kuldastig, men hetta bleiv ikki góðkent, tí mátarin vísti seg at vera í ólagi.

Ta seinastu tíðina hevur tað verið ógvuliga kalt nógvastaðni í Evropa, og nógv fólk eru deyð í kulda. Samstundis hevur tað verið óvanliga lýtt longri norðuri. Eitt nú vóru 9,4 stig á Jan Mayen mikudagin, og tað er heilt óvanligt hesa tíðina á árinum, sigur norska veðurstovan.

## Iran-kreppan nærri loysn

Tað er líkt til, at eitt russiskt neyðsemjuuppskot kann loysa ta spentu støðuna um kjarnorkuætlanina hjá Iran. Russland hevur skotið upp, at Iran skal keypa alt brennievnið til kjarnorkuna úr Russlandi, og at alt kjarnorkuburturkastið skal sendast aftur til Russlands. Á tann hátt ber til at hava eftirlit við iransku kjarnorkuni og at forða fyri, at iranar brúka hana til annað enn orku, siga russar.

USA tekur undir við russiska uppskotinum, og leiðarin á altjóða kjarnorkueftirlitinum, Mohammed ElBaradei, segði í gjár, at uppskotið úr Moskva kann rudda slóð fyri einari semju um iransku kjarnorkuætlanina.

USA og ES hava biðið trygdarráðið hjá ST viðgera iransku ætlanina, men Kina hevur boðað frá, at landið tekur ikki undir við tiltøkum ímóti Iran.

## Hópdrápsmaður var kvinna

Løgreglan í Meksiko Býi heldur seg nú hava loyst gátuna um hópdrápsmannin, sum seinastu árini hevur beint fyri fleiri eldri kvinnum í býnum.

Tað vísir seg kortini, at talan er ikkii um ein hópdrápsmann, men heldur eina kvinnu. Mikudagin tók løgreglan ta 48 ára gomlu Juana Barraza. Onkur hevði sæð hana koma út frá einari eldri kvinnu, sum búði einsamøll, og tá løgreglan fór inn til kvinnuna, var hon deyð. Kanningar staðfestu skjótt, at tann gamla kvinnan var kvald, og undir avhoyringum hósdagin viðgekk Juana Barraza, at hon hevði beint fyri kvinnuni. Seinni viðgekk hon, at hon hevur myrt tvær aðrar eldri kvinnur.

Meksikanska løgreglan ivast ikki í, at Juana Barraza er hópdrápsmaðurin, sum myndugleikarnir hava leitað eftir, og løgreglan roknar við at avdúka tað við fingramerkjum. Tí er hon longu skuldsett fyri at hava myrt 11 eldri kvinnur.

Ein annar spurningur er, hví Juana Barraza legði seg eftir at beina fyri eldri kvinnum, men myndugleikarnir halda, at tað hevur samband við hennara fortíð. Tá hon var ung, sendi mamman hana burtur, og fosturpápin misbrúkti hana kynsliga fleiri ferðir, skrivar AP.